SKÚLIN Á FLØTUM

6. oktober 2021

Skúlastýrið
Skúlin á Fløtum
Hans Andriasar gøta 10
Tórshavn

**Trivnaðarnevndin**
Tórshavnar kommuna
Vaglið
100 Tórshavn

## Svarskriv til grundupptøkuøkir til hoyringar, 21/00971-34

Viðvíkjandi hoyring um grundupptøkuøki hevur skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum hesar viðmerkingar:

a. Skúlastýrið góðtekur tankan um grundupptøkuøki og viðurkennir, at hetta er eitt neyðugt stig at taka fyrisitingarliga. Men skúlastýrið leggur alstóran dent á at ein skiftisskipan má verða galdandi fyri tey, sum í løtuni ganga í forskúla í Skúlanum á Fløtum. Hesi 43 mugu sleppa at halda fram í SáF, um tey ynskja tað. Tey 25 plássini sum eru eftir kunnu standa tøk til onnur eftir upptøkutreytunum til 1. Flokk 2022. Síðan kann hetta markið galda fyri allar komandi forskúlaflokkar, tá treytirnar vóru kendar við innskriving og ikki broyttar afturvirkandi.
b. Framyvir má samskipað mannagongd verða sett í verk fyri allan býin so at næmingar, sum koma í forskúla og búgva í økinum eru automatiskt innskrivaði í 1.flokk eisini, so talan er um eitt greitt og samanhangandi tilboð. Næmingars um verða skrivaðir inn í forskúla, men ikki búgva í økinum skulu automatiskt verða skrivaðir inn í økisskúlan í 1.fl, so øllum er greitt hvør hevlur fram í 1.fl frá fyrsta skúladegi í forskúlanum.
c. Náttúrlig avleiðing av hesum er at kortið við flótandi mørkunummá verða tøkt í góðari tíð. Tvs. 1,5 ár frammanundan innskriving í 1.fl

Vegna Skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum

Á Fløtum 6/10-2021

| Regin Marnersson | Derhard Jógvansson |
|---|---|
| Skrivari | Skúlastýrisformaður |